

Oljugreinarin Thina Saltvedt heldur at oljuídnaðurin hevur brúkt pengar uttan skil. Mynd: Nordea Markets

# Óttast at vitleyst brúk av oljupengum kemur at raka fleiri oljustørv

Jógvan Hugo Gardar

14.06.2015 - 09:25

Oljan.fo

Oljuídnaðurin kann takka sær sjálvum fyri sparingarnar sum nú raka starvsfólkini í ídnaðinum. Oyðslandi pengabrúk er orsøkin, sigur oljugreinarin Thina Saltvedt í Nordea Markets, sambært Dagbladet.

Hon vísir á at lági oljuprísurin saman við dýrum rakstri ger at neyðugt er við sparingum fyri at tryggja at feløgini hava nakað at gera í framtíðini. Men hon meinar at oljufeløgini noyðast at taka á sín egna kappa at støðan er so álvarslig sum hon er.

- Oljuídnaðurin hevur brúkt pengar uttan vit og skil. Tað er lætt at siga aftaná, men nú er veitslan liðugt, og feløgini noyðast at rudda upp, sigur Thina Saltvedt.

Fríggjadagin lak út umvegis Dagens Næringsliv, at Statoil noyðist at koyra 2000 starvsfólk heim, og hetta kemur afturat sparingunum sum komu í 2014, tá millum 1900 og 2000 starvsfólk skuldu sigast upp.

- Hetta vísir okkum hvussu hart trýst er á í oljuídnaðinum í løtuni. Tað at siga starvsfólkum upp er tað seinasta ein leiðsla ger í leitanini eftir sparingum. Hetta vísir okkum eisini hvat leiðslurnar meta um framtíðarútlitini í ídnaðinum, sigur Saltvedt.

Hon fær stuðul frá einum øðrum oljugreinara, Kristoffer Dahlberg, í Sparebank 1 Markets, ið heldur at oljufeløgini hava brúkt alt ov nógvar pengar. Hann leggur afturat at hetta var gjørligt tí oljuprísurin var so høgur, og inntøkurnar góðar. Men nú er tann tíðin farin.

- Nú skal raksturin bera seg, og tað kemur at krevja nógv áðrenn tey eru á mál. Vit óttast at enn fleiri størv hvørva. Eg eri bangin fyri at tað skal gerast enn verri, áðrenn ídnaðurin aftur sær ljós í tunnlinum, sigur Dahlberg